## Stongt vegna summarfrí

Vegna summarfrí verður skrivstovan stongd frá 22. juli til 15. august 2003.

**Sjúkrakassi Skála Læknadømis**
490 Strendur
Tlf. 449212, Fax 449232, t-post: sjkhil@post.olivant.fo

## Summarfrí

Vegna summarfrí verður skrivstovan stongd frá mánadegnum 14. juli 2003.

Opið verður aftur hósdagin 31. juli 2003.

**Advokatskrivstovan**
Fr. Petersensgøta 9
Postboks 6
110 Tórshavn

## Kunngerð

### frá útskiftingarnevndini fyri Gjáar bygd

Útskiftingarfundurin, sum er lýstur at verða í bygdarhúsinum mikudagin 25. juni kl. 10, **er útsettur til mikudagin 16. juli kl. 10.**

Til viðgerðar verður útskifting av hagapartinum Dalur og Fløtur.

Nevndarlimir eru Jørleif Kúrberg, Tórshavn og Heri Samuelsen, Miðvágur.

**N. v.**
**Bjarni Hansen**
**útsk.form.**

## Viðfestisvognur TILBOÐ



v/seyðarimum, næsahjóli og **skráseting.**
Stødd 120 x 205 x 30 - 500 kg.
**einans 8.995,-**
Fáast eisini hjá Balslev,
Klaksvíkar Timburhandli og D.J. Enni

HANSEN · tel 447142 - 218540

## Leiðari til Frítíðarskúlan

Fuglafjarðar býráð loyvir sær hervið at lýsa starvið sum leiðari av frítíðarskúlanum í Fuglafjarðar kommunu leyst til setan tann 15. august 2003 ella skjótast eftir hetta.

**Vit bjóða**
eitt áhugavert starv í einum samfelag, har náttúran og ítrótturin hava stóran týdning í dagliga arbeiðinum.

**Vit ynskja**
*At umsøkjarin skal*
- Hava námsfrøðiliga útbúgving
- Arbeiða sjálvstøðugt
- Hava góð samarbeiðsevni
- Vera førur fyri at taka avgerðir í arbeiði sínum
- Virka fyri góðum samstarvi við starvsfelagar, foreldur og skúlan
- Hava hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum
- Verða við til at menna stovnin í samráð við leiðararnar av ansingarskipanunum í kommununi og við býráðsleiðsluna

Frítíðarskúlin, sum fevnir um ansing av børnum í 1. og 2. flokki, er normeraður til 52 børn 1/1 tíð.

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og Føroya Pedagogfelag.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Bartal Eliasen, leiðara, á telefon 227385, ella Jákup Frants Larsen, býráðsskrivara, á telefon 211102.

Umsóknir saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum skulu vera Fuglafjarðar býráð, Norður í Gerði 10B, 530 Fuglafjørður, í hendi í seinasta lagi **mikudagin 6. august 2003 kl. 15.00.**

Býráðið skilar sær rætt til at velja millum innkomnar umsóknir ella onga at taka.

*Fuglafjørður, tann 11. juli 2003*
**Fuglafjarðar býráð**

## Gravsteinar, kantsteinar og blómubeð

Nú eisini úr Føroyskum gróti

Skjót levering

Prísir við litmyndum verða sendir kring landið og til útlandið

Danstein
www.danstein.fo
Tel. 447512
Tel. 217512
Tel. 318323
Fax 449961
RUNAVÍK - R. C. EFFERSØESGØTA 19, TÓRSHAVN

## Hagstova Føroya

Statistics Faroe Islands

Hagstova Føroya er stongd vegna summarfrí frá 21. juli til og við 1. august 2003.

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3633
**Navn:** Sp/f Sertænastan
**Adressa:** Niels Finsensgøta 51, 100 Tórshavn
**Kommuna:** Tórshavnar Kommuna
**Stovningardato:** 02.07.2003
**Viðtøkudato:** 02.07.2003
**Kapitalur:** Kr. 80.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
**Stovnari:** Hjalgrím Ugge Davidsen, Varðabú 30, 100 Tórshavn.
**Stjórn:** Hjalgrím Ugge Davidsen, Varðabú 30, 100 Tórshavn.
**Tekningarreglur:** Felagið verður teknað av einum stjóra.
**Grannskoðari:** Sp/f Grannskoðarafelagið Rasmussen & Weihe, á Glaðsheyggi, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12.
**Fyrsta roknskaparár:** 02.07.2003 - 31.12.2003
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka handverk, tænastuvirksemi, handil, herundir sølu og keyp av fastari ogn, umboðan og ráðgeving.

*Skráseting Føroya tann 11. juli 2003*

*Kristin Balle*

## FAROE LAW

bjóðar heimligar og altjóða loysnir

Tosið við:
Eyðfinn Jacobsen, advokat
ella
Kára á Røgvu, adv.fulltrúa
um tygara tørv

Tróndargøta 19
P.O.Box 1218
FO-110 Tórshavn
tel 359900 - fax 359901
mobil 219902 - 222857
faroe-law@faroe-law.fo
http://www.faroe-law.fo

Lesið Sosialurin -tað loysir seg

## Vegna summarfrí, verður verkstaðið stongt frá 21. juli til 18. august

AVIS mazda SCANIA

**BERG MOTORS**
Staravegur 1-3 • Tel. 31 35 35 • Fax 31 77 35

## Hygg her!

**Hví mála og pussa, tá ið tú kanst gera bæði í somu arbeiðsgongd.**

**SKALCEM, puss og máling fæst frá**

**Arni Samuelsen**
**tel 455 775**





## Móttøka av ull

Vita taka ímóti ull:

**Frá mikudegnum 16. juli 2003 og fram til ólavssøku.**

Ullin skal vera turr og væl hagreidd, og fyri hetta lata vit:

kr. 6,- pr. kilo íroknað stuðul til eigarar í Eysturoy og Streymoy, og
kr. 8,- pr. kilo íroknað stuðul og ferðastuðul til hini plássini.

Gjørt verður tí vart við, at lægri ella ongin prísur verður latin fyri ull, sum ikki kann gagnnýtast, t.v.s. ull við væl av skarni, sandi, mosa o.ø. í.

Um avtala er gjørd frammundan, er gjørligt at koma við ullini eftir vanliga arbeiðstíð.

**Töting**
Tel 44 10 20 og 21 20 91 · FO-510 Gøta

## ULLAMÓTTØKA

Ullaprísir frá Sirri í Vági

Vit lata kr. 10,- fyri kilo íroknað stuðulsískoyti og lata Sirri vørur í býti.

Vit taka ímóti ull úr øllum landinum og ullamóttøkan hevur opið:
Gerandisdagar kl. 10 - 17

Tel 374 006 - 222 678

Sirri
FØROYSK ULLVØRA
**Tlf. 374006 · Fax 374106**

## Galvaniseraðir Variant viðfestisvognar



- Eykalutir, útgerð, søla og tænasta
- Vit útvega sleipikrókar til øll bilmerki!

**Kaj Andreasen & Co**
Heilsøla • smásøla • umboð
Tel. 31 56 00 • www.andreasen.fo

## MÓTTØKA AV ULL

Í samband við, at ullamóttøkur eru settar á stovn, skal vera sagt frá, at tikið verður ímóti ull soleiðis:

**Frá mikudegnum 16. juli 2003 kl. 09.00**

**á Tøting í gøtu tlf. 44 10 20**
**hjá Sirri í vági tlf. 37 40 06**

Fyri ull, ið er turr og væl hagreidd, verður latið kr. 4,- fyri kilo sum stuðulsískoytið.

Tann parturin av ullini, sum ikki kann gagnnýtast, skal vera skildur frá og beindur burtur á staðnum ella á rættini á forsvarligan hátt.

Gjørt verður tí vart við, at ullamóttøkan skilar sær rætt til at geva lægri ella ongan prís fyri ull, sum ikki kann gagnnýtast, t.v.s. ull við skarni, sandi, mosa o.ø. í.

Flutningsstuðul á kr. 2,00 pr. kilo verður latin til innlatarar, sum ikki búgva í Streymoy, Eysturoy ella Suðuroy.

**Alm. Royndir og ráðgeving**
**Royndarstøðin**
**FO-410 Kollafjørður**